fólkið og líkini, tá vit komu til Grindavíkar.

Tá vit komu til Reykjavík á hotellið, tá orðnaði Dávur, at hann skuldi hava Ziska og meg á sama kamari. Men tað var longu orðnað, alt áðrenn vit komu, at skiparin skuldi hava kamar fyri seg sjálvan.

Alfred Petersen var missionerur tá haryviri, vit fingu eina velduga móttøku bæði av einum og øðrum, og av fleiri føroyskum kvinnum, sum vóru har og øllum møguligum. Eg sjálvur kendi serliga væl eina, sum var gift har, tað var okkara nærmasti nábúgvi í ungum árum, so eg var fyri tað nógva har hjá teimum, meðan eg var í Reykjavík.

Men tá vit komu hendan dagin vóru allir illa klæddir, eingin hevði nakað uppi á beinunum. Tí eg minnist, at tá vit vórðu førdir umborð í Selvog, at allir høvdu skótoy tá, men vit máttu koyra tað niðuríaftur bátin. Men tann sum var serliga illa klæddur, hann fekk eisini klæðir umborð á "Verdandi". Vit fingu klæðir í Reykjavík, og vit vóru serdeilis væl móttiknir, tað skulu teir eiga, eisini eftir tað at vit vóru komnir til Reykjavíkar.

## Tung heimkoma

Vit skuldu heimaftur við Drotningini ("Dronning Alexandrine"). Tað vísti seg, at har vóru bæði føroyingar og íslendingar um okkum, líka inntil at Drotningin var sigld. Drotningin hevði ongantíð verið á Klaksvík fyrr. Hon kom á Pollin við okkum, og har fóru vit so allir í land.

Eg minnist, at tað var ein tung løta, tá teir báðir beiggjarnir møttust, Kjølbro og Dávur. Tað komu einir tveir motorbátar út á Pollin eftir líkunum og eftir okkum.

Eitt lík kom heim seinni. Tað var Rasmus úr Kunoy, sum íslendingarnir høvdu tikið upp aftaná, men vit høvdu so fýra lík heim við okkum. Tað var faðir og sonur úr Tjørnuvík, og báðir bestamenninir. Tá vit so vóru komin í land, var tað mesta av Klaksvíkini har til at taka ímóti okkum. Har var serliga ein mamma, sum ofta rennur fram fyri meg. Sonur hennara (helst Karl Joensen) doyði, og vit høvdu altíð verið kammeratar. Eg minnist, at hon tók um hálsin á mær og vildi bara ikki sleppa mær aftur. Vit fylgdust so øll við líkunum heim í kirkjuna.

Líkini til Tjørnuvíkar fóru dagin eftir, og begravilsið var sama dag í báðum støðum, so vit sluppu ikki at fylgja, men vit vóru so ein sunnudag aftaná í Tjørnuvík.

## Teir sum fórust:

- *Jóan Magnus Høgnesen*, bestimaður, Klaksvík, 31 ár, giftur
- *Jógvan Elias Heinesen*, Tjørnuvík, 45 ár, giftur, og sonur hansara
- *Jóan Hendrik Heinesen*, 21 ár, ógiftur
- *Jógvan Thomassen*, 2. bestimaður, Miðvág, 34 ár, ógiftur, men trúlovaður
- Rasmus Jacobsen, Kunoy, 39 ár, giftur
- Karl Joensen, úr Gerðum, Klaksvík, 22 ár, trúlovaður
- Óla Jákup Hansen, kokkur, á Selheyggi, Klakksvík, 44 ár, ógiftur
- Thomas Thomassen, úti í Bø, Svínoy, 44 ár, giftur
- Hans Jacob Andreassen, Langasand, 44 ár, einkjumaður

## Teir, ið komu aftur vóru:

- Dávur Joensen, skipari, f. 28.10 1889
- Ziska Jacobsen, f. 5.12 1900
- Erik Edvard Lassen, f. 8.1. 1907
- Poul Joensen, motorpassari, f. 26.11 1892
- Eli Elttør
- Óli Martin Samuelsen

Allir úr Klaksvík

- Eliseus Jacobsen, Syðrdalur K f. 24.4. 1894
- Ísak Justinussen, Árnafjørð f. 31.1. 1902
- Hans Kristoffur Olsen, Árnafjørð f. 17.5. 1884
- Kaj Thomassen, Svínoy. f. 19.10 1907. Sonur Tummas, sum doyði
- Mikkjal P. Eliassen, Kirkju, f. 1.9. 1889
- Kristian Karl Christiansen, Lorvík, f. 20.10 1892

Olaf Hjalmar Johansen, Hvalvík f. 5.2. 1902

- Thomas Thomassen, Miðvág, f. 4. 10 1883, beiggi Jógvan sum fórst
- Samuel Ellingsgaard, Miðvágur, f. 16. 6 1896
- Sigmundur Brestirsson Thomsen, Skúvoy f. 6.2. 1893
- Frederik Mikkelsen, Skúvoy f. 24.8. 1890



*Komnir upp á bakkan var gingið undan vindinum. Fyrst varð fylgt við varðunum*



*Síðan fyldu teir telefonpelum*




*Hetta kortið vísir hvar alt hetta hendi*

**Komandi partur**
Í komandi parti verður millum annað frásøgnin hjá Ziska sjálvum, soleiðis hann geiddi frá hesi hending á gamalsaldrinum. Eisini verður greitt frá um Ziska sjálvan

Sosialurin